

Frágreiðing

# Støðan hjá avvarðandi at persónum við demenssjúku í Føroyum

## Ein frágreiðing um spurnakanning gjørd á vári 2025 millum avvarðandi at persónum við demenssjúku

**Sára Reinert**, námslektari
Fróðskaparsetur Føroya

**Maria Skaalum Petersen**, professari
Heilsugranskingareindin í Sjúkrahúsverkinum

Alzheimerfelagið

***Frágreiðing:***

## Støðan hjá avvarðandi at persónum við demenssjúku í Føroyum

Copyright © 2025 Alzheimerfelagið

Rithøvundar: Sára Reinert & Maria Skaalum Petersen

Umbrotið, prentað og heft: Føroyaprent

*Endurgeving úr tekstinum loyvdar við týðiligari kelduávísing. Frágreiðingin verður endurgivin soleiðis: Reinert S & Petersen MS (2025). Støðan hjá avvarðandi at persónum við demenssjúku í Føroyum. Tórshavn. Alzheimerfelagið.*

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerkt prentsmiðja 541 705

# Innleiðing

Leikluturin sum avvarðandi at persóni við demenssjúku er av alstórum týdningi. Drúgva sjúkugongdin hevur við sær, at persónur við demens er bundin av hjálp frá øðrum, og eru hesi aloftast avvarðandi. Gransking uttanlands vísir, at leikluturin kann gerast ein byrða, ið hevur eina neiliga ávirkan á heilsuna hjá avvarðandi (1-5). At veita avvarðandi stuðul verður tí mett at vera ein týdningarmikil og munagóð strategi fyri at minka um byrðuna (6).

Alzheimerfelagið hevur á øðrum sinni skipað fyri spurnakanning millum avvarðandi at persónum við demenssjúku, saman við Mariu Skaalum Petersen, granskara á Heilsugranskingareindini í Sjúkrahúsverkinum og Sáru Skylv Reinert, námslektara á Deildini fyri Heilsu og Sjúkrarøktarvísind á Setrinum.

Eins og við undanfarnu kanning, sum varð gjørd í 2020, var endamálið at lýsa, hvussu gerandisdagurin hjá familjuni verður ávirkaður av demenssjúkuni. At lýsa í hvønn mun avvarðandi uppliva heilsuligar, fíggjarligar og sosialar avleiðingar av leiklutinum sum avvarðandi.

Spurnakanningin er gjørd eftir sama leisti sum áður. Hettar gevur møguleika at samanbera við spurnakanningina frá 2020. Fyri at lýsa hvørji tilboð avvarðandi og persónurin við demens hava fingið bjóðað í samband við demenssjúkuna, eru nakrir spurningar lagdir aftrat síðstu spurnakanning, og hesir eru serliga í mun til nøgdsemi.

Kunnað varð um spurnakanningina á heimasíðuni og Facebook síðuni hjá Alzheimerfelagnum, Landssjúkrahúsinum, og Heilsugranskingareindini, eins og kunningartilfar varð hongt upp eitt nú á ellis- og røktarheimum og kommunulæknaviðtalum. Kunnað varð eisini um kanningina í Kringvarpi Føroya og við tíðindabrævi á ymiskum portalum.

Heitt varð á avvarðandi at persónum við demens at svara talgilda spurnablaðnum. Íalt 313 svaraðu spurnakanningini, sum gekk fyri seg frá 26. mars til 15. mai 2025.

Í hesi frágreiðing framgongur persónurin við demenssjúku undir heitinum „persónur“ og heitið „avvarðandi“ sipar til avvarðandi hjá persóni við demenssjúku.



# Innihaldsyvirlit

**Samandráttur** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **6**

**Hvør hevur svarað kanningini?** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **8**

**Ávirkan á heilsuna hjá avvarðandi** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **11**

**Ávirkan á gerandisdagin hjá avvarðandi** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **16**

Ávirkan á arbeiðslívið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 16

Ávirkan á tvístøður í familjuni . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 18

Ávirkan á frítíðarlívið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 18

**Stuðul og tilboð í gerandisdegnum** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **20**

Nøgdsemi við tilboð til demenssjúk . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 20

Nøgdsemi við tilboð til demenssjúk, búsitandi á stovni . . . . . . . . . . . 26

Nøgdsemi um tilboð og kunning til avvarðandi . . . . . . . . . . . . . . . 29

**Niðurstøða** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **32**

Ávirkan á gerandisdagin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 32

Stuðul og tilboð í gerandisdegnum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 32

Samanumtøka . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 33

**Tilvísingar** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **34**



# Samandráttur

Alzheimerfelagið hevur á øðrum sinni, saman við Mariu Skaalum Petersen, granskara á Heilsugranskingareindin í Sjúkrahúsverkinum, og Sáru Skylv Reinert námslektara á Deildini fyri Heilsu og Sjúkrarøktarvísind á Setrinum, skipað fyri dulnevndari, talgildari spurnakanning um støðuna hjá avvarðandi at persóni við demenssjúku.

Endamálið var eins og við undanfarnu kanning gjørd í 2020 at lýsa, hvussu gerandisdagurin hjá avvarðandi verður ávirkaður av demenssjúkuni, t.v.s. um heilsa, fíggjarstøða, frítíðarlív ella arbeiðslív er ávirkað av leiklutinum sum avvarðandi at persóni við demenssjúku. Við at endurtaka kanningina er møguligt at meta um støðan er hin sama, ella um støðan hjá avvarðandi er broytt.

Íalt 313 avvarðandi svaraðu kanningini; 80% eru kvinnur, og meginparturin av svargevum (98%) eru í familju við persónin við demenssjúku – helvtin (54%) eru børn hjá persóni við demenssjúku. Tey flestu (91%) vóru avvarðandi at persóni 67 ár ella eldri, og tveir triðingar (67%) eru í starvi.

Kanningarúrslitini líkjast úrslitunum í fyrru kanningini og vísa greitt, at avvarðandi eru ávirkað av sjúkuni í gerandisdegnum.

## Kanningarúrslitini vísa millum annað hettar:

### Heilsan hjá avvarðandi er ávirkað

- Tveir triðingar (65%) av teimum avvarðandi svara, at leikluturin sum avvarðandi ávirkar heilsuna neiliga.
- Helvtin ella meira uppliva strongd og svøvntrupulleikar
- Kvinnur og menn ávirkast eins.

### Gerandisdagurin er ávirkaður

- Fýra av tíggju (39%) siga, at leikluturin sum avvarðandi ávirkar arbeiðslívið.
- Fjórði hvør (27%) sigur, at leikluturin sum avvarðandi ávirkar fíggjarstøðuna.
- Meira enn helvtin (56%) sigur, at leikluturin sum avvarðandi hevur við sær tvístøður í familjuni.
- Fjórði hvør sigur, at leikluturin sum avvarðandi hevur við sær, at tey eru avmarkað í mun til tíð til sín sjálvs (27%) og hava avmarkaðan møguleika at ferðast (24%).



## Tilboð til persónin við demenssjúku

- Persónar við demens fáa tilboð, men tað eru eisini tilboð, sum fleiri avvarðandi svara, at persónurin ikki hevur fingið bjóðað.
- Tað er ymiskt, hvussu væl avvarðandi meta, at persónurin verður stuðlaður av teimum tilboðum, sum hann hevur fingið bjóðað. Tað er serliga dagtilboð/virkistilboð, sum avvarðandi siga, at persónurin við demens í stóran mun er stuðlaður av (41%).
- Avvarðandi til demenssjúk yvir 67 ár eru meira nøgd við tilboð til persónin við demens enn avvarðandi til demenssjúk undir 67, men í báðum førum eru tað færri enn 30%, sum í stóran mun eru nøgd.

## Nøgdsemi við tilboð til persónar við demenssjúku, sum eru búsitandi á stovni

- Meira enn helvtin av avvarðandi eru í stóran mun nøgd við samstarv við starvsfólk, við fysisku karmarnar og við samskifti og samstarv við leiðsluna.
- Seks av tíggju (59%) avvarðandi eru í lítlan mun ella als ikki nøgd við virkismøguleikar gjøgnum dagin, og fýra av tíggju (46%) eru í lítlan mun ella als ikki nøgd við kontaktpersónskipanina.

## Tilboð til avvarðandi

- Avvarðandi føla seg ikki í stóran mun stuðlað av tilboðum til avvarðandi.
- Hóast batar síðani seinastu kanning, eru framvegis lutfalsliga nógv tilboð, sum avvarðandi svara seg ikki hava fingið bjóðað, millum tvey av tíggju (20%) til fimm av tíggju (53%).
- Fýra av tíggju (37%) til seks av tíggju (63%) avvarðandi kenna seg ikki kunnað um tilboð til avvarðandi frá stovnum, ið varða av demensøkinum.
- Tvey av tíggju (21%) til fimm av tíggju (47%) avvarðandi siga, at tey hava ikki brúkt tilboð, sum tey hava fingið bjóðað.

# Hvør hevur svarað kanningini?

Kanningin fór fram frá 26. mars til 15. mai í 2025, og 313 avvarðandi hava svarað kanningini. Men tað eru ikki øll, sum hava svarað øllum spurningunum, so endaliga talið av svargevum er ikki altíð tað sama. Íalt 80% (n=250) av svargevunum eru kvinnur.

Flestu svargevar eru í familju við persónin við demenssjúku, sí mynd 1. Helvtin (54%) eru børn hjá persóni við demenssjúku, meðan fimti hvør (21%) er hjúnafelagi. Av teimum 251 svargevunum, sum hava svarað spurninginum um egnan aldur, vóru 78% yngri enn 67 ár, og tveir triðingar (67%) í starvi.

Flestu svargevar eru avvarðandi at persónum í aldrinum 80-84 ár, sí mynd 2.

Av teimum 271 svargevunum, sum hava svarað spurninginum um aldur á persóninum við demens, vóru tey flestu (91%; n=247) avvarðandi at persóni 67 ár ella eldri. Sostatt eru bert 9% (n=24) av svargevunum avvarðandi at persóni við demenssjúku yngri enn 67 ár.

Tilknýtið til persónin við demens




**Mynd 1:** Tilknýtið millum avvarðandi og persónin við demens sjúku (n=312).

Av teimum 239, sum hava svarað spurninginum um persónurin er búsitandi á stovni, siga fýra av tíggju (40%; n=95) svargevum, at so er.

Knapt helvtin (46%) av svargevum búgva í Suðurstreymoy, meðan 28% eru búsitandi í Eysturoy, 8% búgva í Norðoyggjum, 5% í Suðuroy, 4% búgva ávikavist í Sandoy og Vágum og 3% búgva í Norðstreymoy.

Íalt 85% av svargevum siga, at persónurin er sjúkuútgreinaður. Flestu persónar við demens (85%), ið eru sjúkuútgreinaðir, eru útgreinaðir á Demensklinikkini á Landsjúkrahúsinum, 3% hjá kommunulækna, 5% vita ikki og av teimum 7%, ið viðmerkja „annað", er meirilutin útgreinaður í Danmark.

Sindur minni enn helvtin (46%) av persónunum við demens hava diagnosuna Alzheimer, 5% vaskuler demens, 5% frontotemporal demens, 2% Lewy Body demens, 3% hava skrivað annað, meðan 39% av svargevum ikki vita, hvat slag av demens persónurin hevur (mynd 3). Samanborið við síðstu kanning eru tað fleiri, ið ikki vita, hvat slag av demenssjúku persónurin hevur (39% mótvegis 34%), og heldur færri, ið svara at persónurin við demens hevur Alzheimer (46% mótvegis 51%) (7). Tá meira enn ein triðingur av svargevunum ikki vita, hvat slag av demens persónurin hevur, gevur hettar ábending um, at allir persónar ikki hava fingið eina diagnosu, ella at avvarðandi ikki eru kunnað um, hvørja diagnosu persónurin hevur.

Gott ein triðingur av svargevunum (34%) vísa á, at persónurin við demens er knýttur at Heilsu- og Umsorganartænastuni í høvuðsstaðarøkinum, 17% eru knýtt at Roðanum, 11% eru knýtt at Nánd, 8% eru tilknýtt Norðoya Bú- og Heimatænastu, 6% eru knýtt at Suðuroyar Bú- og Heimatænastu og 4% eru knýtt at ávikavíst Vesturvón og Veks, 2% eru knýtt at Almannaverkinum, 3% eru knýtt at Økistænastuni í Sandoyar sýslu, 4% svara annað og 8% av svargevum vita ikki, hvørja heimatænastu persónurin er tilknýttur. Tað sæst, at fleiri av svargevunum búgva nærhendis per-



sóninum við demens, og hettar er mest sannlíka orsøk til, at fáir (5%) svargevar hava havt tørv á at flyta bústað.

Tað ber ikki til at siga, hvussu nógv avvarðandi eru til fólk við demenssjúku í Føroyum. Tí er tað trupult at siga, um úrslitini frá kanningin er umboðandi fyri øll avvarðandi. Hendan kanningin kann tó saman við fyrru kanningini geva eina ábending um, hvussu avvarðandi uppliva sín gerandisdag, og hvørjar avbjóðingar gera seg galdandi. At báðar kanningar vísa líknandi úrslit, gevur okkum størri vissu fyri, at kanningin er umboðandi. Sostatt kann kanningin varpa ljós á tær avbjóðingar, hesar familjur standa við í Føroyum.




**Mynd 2:** Aldursbýti av persónum við demens sjúku í spurnakanningini (n=271).




**Mynd 3:** Útgreinan av hvat slag av demenssjúku persónar við demens hava (n=310).

# Ávirkan á heilsuna hjá avvarðandi

Eins og við undanfarnu kanning hjá Alzheimerfelagnum í 2020 vísir hendan kanningin, at heilsustøðan hjá avvarðandi er ávirkað. Tveir triðingar (65%; n=184) siga, at teirra heilsustøða er ávirkað av leiklutinum sum avvarðandi at persóni við demenssjúku. Størstu trupulleikarnir eru eins og í fyrru kanningini strongd, svøvntrupulleikar, og tunglyndi. Íalt 61% av teimum, hvørs heilsustøða er ávirkað, siga seg uppliva strongd, 70% siga seg hava svøvntrupulleikar, og 36% siga seg hava tunglyndi. Hettar er áleið tað sama sum fyrra kanningin vísti (7). Úrslitini eru í samsvar við gransking uttanlands, ið vísir, at leikluturin sum avvarðandi kann hava neiliga ávirkan á heilsuna, m.a. økja um vandan fyri m.a. tunglyndi, angist, svøvntrupulleikum og strongd (3, 8-10). Í hesi kanning, eins og undanfarnu (7), og í tilsvarandi danskari kanning (11), er tað serliga strongd og svøvntrupulleikar, sum avvarðandi uppliva. Svøvntrupulleikar kunnu ávirka lívsgóðsku, likamliga og sálarliga heilsu og eru tengdir at øktum vanda fyri øðrum sjúkum, m.a. høgum blóðtrýsti, diabetes og hava eyðkenni av tunglyndi (12).

Um vit taka allar svargevar við (ikki bert teir, sum siga sína heilsustøðu verða neiliga ávirkaða), svarar tað til, at 40% siga seg hava strongd, 46% svøvntrupulleikar og 24% tunglyndi orsakað av teirra støðu sum avvarðandi.

**Hevur tín leiklutur sum avvarðandi ávirkað tína heilsustøðu á neiligan hátt?**




**Mynd 4:** Ávirkan á heilsustøðuna (n=281)

Somuleiðis sást, at av teimum, sum uppliva ávirkan á heilsuna, uppliva 53% eisini ávirkan á arbeiðslívið, og 40% av svargevum, ið uppliva ávirkan á heilsu, uppliva eisini ávirkan á fíggjarstøðuna.

Meirilutin (80%) av svargevunum í kanningini eru kvinnur. Ein slík yvirumboðan av kvinnum var eisini í tí fyrru kanningini (82%) og í eini danskari kanning frá 2018 (80%) (11). Ein yvirumboðan av kvinnum sæst ofta í spurnakanningum, men hendan yvirumboðanin av kvinnum endurspeglar sannlíkt uppgávu- og ábyrgdarbýtið mill-

## Heilsutrupulleikar hjá avvarðandi




**Mynd 5:** Heilsutrupulleikar hjá avvarðandi, ið svaraðu ja, at teirra heilsustøða var ávirkað (n=184)

um menn og kvinnur, tá tað snýr seg um umsorgan og røkt av familjulimum.

Í mun til kyn siga 67% av kvinnunum og 59% av monnum, at teirra heilsustøða er ávirkað, sí mynd 6, samanborið við 63% av kvinnunum og 55% hjá monnunum í fyrru kanningini. Ávirkanin á heilsustøðuna hjá kvinnum er eitt vet hægri enn hjá monnum, men hesin munur hevur ikki hagfrøðiligan týdning (p= 0, 2). Tá hugt verður eftir, hvørjar heilsutrupulleikar kvinnur og menn siga seg hava, sæst ein munur millum kynini (mynd 7); kvinnurnar ávirkast í størri mun av strongd, svøvntrupulleikum og vøddaspenningum, meðan menn siga seg í størri mun uppliva tunglyndi. Hettar samsvarar væl við úrslitini frá kanningini frá 2020.

Í alt 63% (n=15) av avvarðandi til persón yngri enn 67 ár, siga seg hava ávirkaða heilsustøðu, og 65% av avvarðandi til persón eldri enn 67 ár. Í hesi kanning er eingin hagfrøðiligur munur á ávirkan á heilsuna hjá avvarðandi, um persónurin er yngri ella eldri enn 67 ár (p=0,25). Men

**„At tú ikki strekkir til, at alt gongur so strilti at fáa alt at koyra“**

*Barn at persóni við demens*




**Mynd 6:** Ávirkan á heilsustøðuna í mun til kyn (kvinnur n=221, menn n=59)




**Mynd 7:** Heilsutrupulleikar hjá avvarðandi, sum svaraðu ja, at teirra heilsustøðu er ávirkað í mun til kyn (kvinnur n=148, menn n=35).



harafturímóti tykist munur vera á slag av heilsutrupulleikum tey avvarðandi føla, alt eftir um persónurin er yngri ella eldri enn 67 ár.

Av avvarðandi til persón yngri enn 67 ár, ið hava svarað, at heilsustøðan er ávirkað, upp- liva 47% strongd, 67% svøvntrupulleikar og 13% tunglyndi, samanborið við avvarðandi at persóni eldri enn 67 ár, har 63% upp- liva strongd, 69% uppliva svøvntrupulleikar og 38% tunglyndi, t.v.s. at avvarðandi til persónar yvir 67 ár uppliva oftari strongd, svøvntrupulleikar og tunglyndi. Avvarðandi at persóni yngri enn 67 ár siga seg oftari hava angist (27% í mun til 20%).

Hesi úrslit samsvara við fyrru kanningina, men vit síggja ikki í hesi kanning, at avvarð- andi at persónum yngri enn 67 ár oftari hava tunglyndi, sum fyrra kanningin vísti, og sum danska kanningin vísti (11).

**„Ikki so at tað hevur viðført diagnosur, men stressrelaterað symptomir hugsi eg, troyttheit, konsentratiónsbesver o.l.“**

*Barn at persóni við demens*

## Heilsuávirkan hjá avvarðandi býtt í mun til aldurin hjá persóninum




**Mynd 8:** Heilsuávirkan hjá avvarðandi, sum svaraðu ja, at teirra heilsustøða er ávirkað í mun til aldurin hjá persóninum við demens. (n=15 avvarðandi at persóni <67 ár; n=144 avvarðandi at persóni ≥ 67 ár).

# Ávirkan á gerandisdagin hjá avvarðandi

## Ávirkan á arbeiðslívið

Av teimum, sum hava svarað hesi spurnakanning, eru tveir triðingar (67%) í starvi, ein fjórðingur (24%) eru pensjonistar, 4% eru undir útbúgving, meðan hini eru heimagangandi ella í farloyvi.

Eins og í undanfarna kanning vísti, vísir hendan kanningin eisini, at arbeiðslívið verður ávirkað av leiklutinum sum avvarðandi. Fýra av tíggju (39%; n=121) siga, at teirra arbeiðslív er ávirkað av leiklutinum sum avvarðandi. Av hesum siga 59%, at fíggjarstøðan eisini er ávirkað. Samanborið við fyrru kanning eru eitt sindur færri, sum siga, at teirra arbeiðslív er ávirkað (39% mótvegis 44%), men hjá teimum, har arbeiðslívið er ávirkað, eru fleiri í hesi kanning, sum siga at fíggjarstøðan eisini er ávirkað (59% mótvegis 40%).

Mynd 9 vísir útgreining av ávirkan á arbeiðslívið hjá teimum, sum svaraðu, at teirra arbeiðslív var ávirkað. Millum annað sæst,




**Mynd 9:** Ávirkan á arbeiðslívið hjá avvarðandi, sum svaraðu, at teirra arbeiðslív er ávirkað (n=121).



at 32% hava takkað nei til nýggjar møguleikar á yrkisleiðini samanborið við 31% í fyrru kanningini, 31% eru farin niður í tíð samanborið við 20%, og 15% eru ella hava verið sjúkrameldað samanborið við 11% í fyrru kanningini. Úrslitini frá kanningini benda á, at nógv fleiri avvarðandi arbeiða niðursetta tíð nú enn í 2020.

Um vit taka allar svargevar við (ikki bert teir, sum siga, at arbeiðslívið verður ávirkað), svarar tað til, at 13% hava takkað nei til nýggjar møguleikar, 12% eru farin niður í tíð og 6% eru sjúkrameldað.

Í hesi kanning sást, at flestu hjúnafelagar, sum hava svarað, eru farin frá við pensjón og uppliva ikki størri ávirkan á arbeiðslívið enn onnur, meðan 45% av avvarðandi, sum eru børn hjá persóni við demenssjúku, uppliva størri ávirkan á arbeiðslívið, í mun til onnur avvarðandi (p=0,01).

Íalt 23% av børnum, ið uppliva ávirkan á arbeiðslív, eru vorðin sjúkrameldað, 36% arbeiða niðursetta tíð, og 11% hava skift yrkisleið. Meiri enn triðingurin av børnunum, ið uppliva ávirkan á arbeiðslívið, greiða undir „annað“ frá, at arbeiðsdagurin er merktur av at muga fara frá arbeiði við foreldrum til alt frá lækna til frisør.

Somuleiðis svaraðu 27% av svargevunum, at teirra fíggjarstøða var ávirkað, og tað eru serliga hjúnafelagar, sum uppliva ávirkan á fíggjarstøðuna í mun til onnur avvarðandi (p=0,01). Serliga eru tað lægri inntøkur og hægri útreiðslur, sum ávirka teir hjúnafelagar, ið hava ávirkaða fíggjarstøðu. Flestu hjúnafelagar, ið svara kanningini, eru pensjonistar.

# „Minni møguleiki fyri at arbeiða yvir, og fleiri feriudagar/avspáking verða brúkt uppá foreldrini“

*Barn at persóni við demens*

## Ávirkan á tvístøður í familjuni

Í mun til tvístøður siga meira enn helvtin (56%; n=159) av avvarðandi seg uppliva tvístøður í familjuni, sí mynd 10. Hettar er eitt vet færri, samanborið við kanningina frá 2020, 56% mótvegis 59%. Tvístøðurnar, sum tey avvarðandi uppliva, eru m.a. ymisk sjónarmið um handfaring av sjúkuni, hvussu sjúkur persónurin við demens er, og hvussu tosað verður við persónin við demenssjúku, sí mynd 11. Serliga eru tað børn at persónum við demenssjúku, ið uppliva tvístøður, men sjálvar tvístøðurnar snúgva seg um somu viðurskifti sum í 2020.

### Eg havi upplivað tvístøður í mínari familju orsakað av demenssjúkuni




**Mynd 10:** Tvístøður í familjuni orsakað av demensjúkuni (n=282)

## Ávirkan á frítíðarlívið

Spurt varð eisini um ávirkan á frítíðarlív hjá avvarðandi. Sum heild er tað ymiskt, hvussu avvarðandi uppliva avmarkingar í frítíðarlívinum (mynd 12). Vit síggja, at 27% ofta uppliva, at tey eru avmarkað í mun til tíð til sín sjálvs, og 24% uppliva ofta at hava avmarkaðar møguleikar at ferðast. Men sum heild uppliva eitt sindur fleiri í hesi kanning enn í fyrru kanningini, at frítíðarlívið verður ávirkað av leiklutinum sum avvarðandi. Hesi tøl vóru ávíkavist 20 og 19% í fyrru kanningini.

Á mynd 12 sæst eisini, at 29% av og á uppliva avmarkaðar møguleikar at hitta vinir og luttaka í frítíðartilboðum, meðan 29% ongantíð uppliva hesa avmarking.

Taka vit eisini tey, sum siga, at teirra frítíðarlív av og á er ávirkað, uppliva meira enn helvtin (56%), at tey eru avmarkað í mun til tíð til sín sjálvs, og beint undir helvtin (48%) at hava avmarkaðar møguleika at ferðast og at luttaka í frítíðarlívi.

Spurningur um avmarkingar at luttaka í tilboðum fyri avvarðandi er lagdur afturat. Tað sæst, at 12% siga seg ofta hava avmarkingar at luttaka í tilboðum til avvarðandi, 16% siga av og á, meðan 33% ongantíð uppliva avmarkingar í mun til luttøku í tilboðum fyri avvarðandi.

## Tvístøður í familjuni snúgva seg um




**Mynd 11:** Útgreining av tvístøðum í familjuni orsakað av demenssjúku (n=159)

## Sum avvarðandi havi eg avmarkaðar møguleikar...




**Mynd 12:** Ávirkan á frítíðarlív hjá avvarðandi orsakað av demenssjúkuni

# Stuðul og tilboð í gerandisdegnum

Í Demensætlanini frá 2015 stendur *„at tað er umráðandi, at tey avvarðandi verða viðurkend fyri tann innsatsin tey gera, og at tey hava lætta atgongd til tilboð um hjálp“* (13). Gransking vísir, at tilboð, sum stuðla avvarðandi í gerandisdegnum, t.d. ráðgeving, undirvísing og stuðul skulu veitast tíðliga, skipast og tillagast fyri at økja og betra um støðuna hjá avvarðandi og fyribyrgja ávirkan á heilsu, arbeiði og frítíð (14-17). Í Demensætlanini verður eisini víst á, at fyri at skapa eitt demensvinarligt samfelag eiga tilboðini til fólk við demens at vera góð, fakliga grundað og fjølbroytt, tí tað skapar trivnað og lættir um hjá tí sjúka og teimum avvarðandi (13).

Fyri at lýsa hvørji tilboð personurin við demens og tey avvarðandi hava fingið bjóðað í samband við demenssjúkuna, og hvørja kunning tey avvarðandi hava fingið, er spurt um nøgdsemið við hesi tilboð. Hesir spurningar vóru ikki í fyrru spurnakanningini frá 2020. Í niðanfyristandandi brotum verða svarini uppá hesar spurningar lýst. Tað eru umleið tveir triðingar av svargevunum, sum hava svarað hesum spurningunum.

## Nøgdsemi við tilboð til demenssjúk

Í kanningini varð spurt, í hvønn mun avvarðandi mettu, at persónurin við demenssjúku varð stuðlaður av ymiskum tilboðum. Á mynd 13 sæst, hvussu avvarðandi meta, at tilboð rætta persónum við demenssjúku eru stuðlandi, býtt yvir alt landið og øll avvarðandi.

Tað, sum flest avvarðandi siga verða stuðlandi í stóran mun fyri persónin við demens er dagtilboð/virkistilboð (41%), heimahjálp (29%), heimavitjan frá demenssamskipara (24%) og matartænasta (24%).

Samanbera vit við kanningina frá 2020, mettu 11%, at persónurin við demens í stóran mun varð stuðlaður av heimavitjan frá demenssamskipara samanborið við 24% í hesi kanning. Íalt 35% mettu í 2020, at persónurin í stóran mun varð stuðlaður av dag/virkistilboði samanborið við 41% í hesi kanning. T.v.s. at úrslitini benda á størri stuðul og nøgdsemi við ávís tilboð. Tað skal tó eisini sigast, at 37% í lítlan mun meta at persónurin við demens verður stuðlaður av heimavitjan frá demenssamskipara. So tølini benda eisini á, at hetta kann betrast.

Hinvegin eru fleiri tilboð, sum avvarðandi meta, at persónurin als ikki verður stuðlaður av ella hann ikki hevur fingið bjóðað. Tað er m.a. galdandi fyri ergoterapi/fysioterapi/musikterapi, sum 35% meta ikki er stuðlandi, og sum 32% ikki hava fingið bjóðað, og kognitiva stimulatiónsterapi, sum 35% meta ikki er stuðlandi, og 36% ikki hava fingið bjóðað. Hetta kundi bent á, at hesi tilboð ikki

# Í hvussu stóran mun verður mett, at persónurin verður stuðlað/ur við hesum tilboðum?




**Mynd 13:** Tilboð til persónar við demens.




**Mynd 14:** Kunning um tilboð, ið verða bjóðað persóninum við demens yngri enn 67 ár

er útbreidd á demensøkinum. Fá kenna at undirvísing og ráðgeving frá Demenslinjuni er stuðlandi, og avvarðandi halda heldur ikki, at demenssjúk verða nóg væl stuðlaði av fakligum kontaktpersóni og frá Hjálpitólamiðstøðini. Í Demensætlanini verður mælt til vitanarsavnan og miðlan av hjálpitólum, og eisini verður víst á fyrimunir við kontaktpersónskipan (13).

Sum heild eru tølini, har avvarðandi hava svarað 'ikki bjóðað' framvegis lutfalsliga høg, eitt nú viðv. bólkum til demenssjúk og venjingartilboðum, og tað vísir, at tað antin framvegis eru ov fá tilboð kring landið, ella at kunningin um hesi ikki er nóg góð.

Tað sæst ein munur á, hvussu stuðlandi hjúnafelagar meta heimahjálp vera í mun til hini avvarðandi. Tað eru bert 13% av hjúnafeløgum, ið meta, at heimahjálp í stóran mun er stuðlandi fyri persónin við demens. Somuleiðis sæst ein munur á metingini hjá hjúnafeløgum í mun til matartænastur, har bert 7% meta hesa tænastu stuðlandi í stóran mun til hini avvarðandi.

Spurt varð eisini um, í hvussu stóran mun avvarðandi vórðu kunnað um tilboð til persónin við demens, og um tey tilboð, ið eru bjóðað. Um fyrst verður hugt eftir svarinum hjá avvarðandi, tá persónurin við demens er yngri enn 67 ár (mynd 14), síggja vit, at einans 13% í stóran mun eru kunnað um tilboð til persónin við demens frá Demensklinikkini, meðan 40% als ikki kenna seg kunnað. Beint yvir helvtin (53%) kenna seg als ikki kunnað um tilboð frá Almannaverkinum. Vit gera vart við, at talið av avvarðandi til persónar yngri enn 67 ár er lágt (n=16), so tí skulu hesi tøl takast við fyrivarni.

Íalt 27% eru nøgd við tilboð frá Demensklinikkini til persónin við demens 67 ár og eldri, og 13% við tilboð frá Almanna-



**„Sum avvarandi til ein undir 67 ár við demens-sjúku havi eg eina kenslu av at verða kastaði aftur og fram millum Almannaverkið og kommununa. Eisini merki eg, at pápi hevur færri tilboð enn tey yvir 67 ár við demenssjúku.“**

*Barn hjá persóni við demens*

## Í hvussu stóran mun hevur tú verið *nøgd/ur við tilboð* til persónin við demens ( <67 ár)




**Mynd 15:** Nøgdsemi hjá avvarðandi við tilboð til persónar við demens yngri enn 67 ár

verkinum, meðan ávikavist 33% og 47% als ikki eru nøgd við tilboð, sí mynd 15.

Um hugt verður at, í hvussu stóran mun avvarðandi til persón 67 ár og eldri kenna seg kunnað um tilboð, síggja vit, at ein av fimm (21%) siga seg hava fingið kunning frá Demensklinikkini í stóran mun, og ein fjórðingur hava í stóran mun fingið kunning frá kommununum, meðan ávikavist 38% og 33% av avvarðandi siga seg als ikki hava fingið kunning um tilboð til persónin (mynd 16). Trý av tíggju (29%) av avvarðandi eru í stóran mun nøgd við tilboð til persónin 67 ár og eldri frá kommununi, meðan ein av fimm (20%) í stóran mun eru nøgd við tilboð frá Demensklinikkini, sí mynd 17. Ávikavist 25% og 26% eru als ikki nøgd við tilboð frá kommununi og Demensklinikkini, og 25% og 31% vita ikki.

## Nøgdsemi við tilboð til demenssjúk, búsitandi á stovni

Spurt varð somuleiðis um nøgdsemi millum avvarðandi, har persónurin við demenssjúku er búsitandi á ellis- ella røktarheimi. Fýra av tíggju (n=95) av svargevum, sum svaraðu hesum spurningi, siga seg vera avvarðandi til ein persón við demens, ið er búsitandi á stovni. Talva 1 útgreinar teirra nøgdsemi við ymisk viðurskiftir á stovnum. Talvan vísir m.a., at avvarðandi í stóran mun eru nøgd við samstarvið við starvsfólk (60%), fysisku karmarnar á stovninum (52%) og samskiftið og samstarvið við leiðsluna (51%). Hinvegin sæst, at 36% av avvarðandi als ikki eru nøgd við teir virkismøguleikar, persónurin hevur gjøgnum dagin og 26% eru als ikki nøgd við kontaktpersónsskipanina til tann avvarðandi.




**Mynd 16:** Kunning um tilboð, ið verða bjóðað persóninum við demens 67 ár og eldri




**Mynd 17:** Nøgdsemi hjá avvarðandi við tilboð til persónar við demens 67 ár og eldri

Taka vit tey við, sum í lítlan mun eru nøgd, eru tað 6 av 10 (59%), sum í lítlan mun ella als ikki eru nøgd við virkismøguleikar, og 4 av 10 (46%), sum í lítlan mun ella als ikki eru nøgd við kontaktpersónskipanina.

Eitt annað, sum er vert at leggja til merkis er, at fýra av tíggju (43%) av avvarðandi ikki vita, um tey eru nøgd við brúk av stillandi heilivági. Tað bendir á, at nógv avvarðandi vita lítið um júst hettar.

## Nøgdsemi við tilboð og kunning til avvarðandi

Tilboð og tænastur eru ymiskar kring landið, og nøkur økir eru betri umboðað í hesi kanning enn onnur. Í kanninginI varð spurt um, hvar í landinum tey avvarðandi búgva, men vit hava valt at vísa býtið yvir alt landið, sí talvu 2.

Vit spurdu í hvussu stóran mun tey avvarðandi verða stuðlað av sjey ymiskum tilboðum og tiltøkum, sí talvu 2. Yvirskipaða myndin er, at millum tvey av tíggju (20%) og fimm av tíggju (53%) av avvarðandi, alt eftir hvat tilboð talan er um, ikki hava fingið bjóðað ávís tilboð til avvarðandi. T.d. hava gott 30% av avvarðandi ikki fingið bjóðað ráðgeving frá landsdemenssamskiparа ella kommunalum demenssamskipara, meðan onnur 20% siga seg ikki hava brúkt hettar tilboð. Tað merkir, at nærum helvtin ella meira av teimum avvarðandi í hesi kanning ikki hava brúkt ella fingið bjóðað ráðgeving frá demenssamskiparum. Tó eru nøkur tilboð, sum lutfalsliga nógv avvarðandi hava fingið bjóðað, og sum tey kenna seg stuðlaði av. Tey eru ráðgeving frá landsdemenssamskiparum frá Demensklinikkini, ráðgeving frá kommunalum demenssamskipara, avvarðandi bólkar og kunningarsíður, sum avvarðandi kenna seg

**Nøgdsemi millum avvarðandi, tá persónurin við demenssjúku er búsitandi á stovni**

| Býtt yvir øll avvarðandi | Í stóran mun | Í lítlan mun | Als ikki | Veit ikki |
|---|---|---|---|---|
| *Samskifti og samstarv við leiðsluna* | 51% | 25% | 11% | 13% |
| *Fakligu førleikar hjá starvsfólkum* | 41% | 35% | 10% | 14% |
| *Samstarv við starvsfólk* | 60% | 21% | 6% | 13% |
| *Virkismøguleikar persónurin hevur gjøgnum dagin* | 22% | 23% | 36% | 19% |
| *Kontaktpersónsskipan til tín sum avvarðandi* | 34% | 19% | 26% | 20% |
| *Brúk av stillandi heilivág* | 32% | 14% | 11% | 43% |
| *Fysisku karmar á stovninum* | 52% | 21% | 15% | 12% |

**Talva 1:** Nøgdsemi hjá avvarðandi, tá persónurin við demenssjúku er búsitandi á stovni.

### Í hvussu stóran mun ert tú sum avvarðandi stuðlaður av tilboðum og tiltøkum?

| Býtt yvir øll avvarðandi | Í stóran mun | Í lítlan mun | Als ikki | Ikki brúkt | Ikki fingið bjóðað |
|---|---|---|---|---|---|
| *Avvarðandi bólkar* | 15% | 11% | 10% | 29% | 35% |
| *Sosial tiltøk hjá Alzheimerfelagnum sum t.d. demenskafe* | 5% | 13% | 10% | 41% | 31% |
| *Ráðgeving frá Demenslinjuni hjá Alzheimerfelagnum* | 4% | 13% | 9% | 47% | 27% |
| *Ráðgeving frá landsdemens-samskiparum frá Demensklinikkini* | 16% | 24% | 9% | 21% | 29% |
| *Ráðgeving frá kommunalum demenssamskipara (t.e.kontaktpersóni)* | 14% | 26% | 9% | 22% | 30% |
| *Avvarðandi undirvísing á Demensklinikkini* | 8% | 23% | 9% | 24% | 37% |
| *Kommunalt skeið/ undirvísing veitt avvarðandi* | 2% | 3% | 16% | 25% | 53% |
| *Heima- og facebook-síður, sum t.d. Alzheimerfelagið, „Demens er noget vi taler om“, „Videncenter for demens“* | 17% | 26% | 10% | 26% | 20% |

**Talva 2:** Tilboð og tiltøk til avvarðandi

**„Tá demens verður staðfest, er tað ringt sum avvarðandi at vita, hvar man skal venda sær, og hvussu man skal vera um ein sum hevur demens. Hóast faldarar, sosialir miðlar hava eina rúgvu av kunning. Møguliga er tað tí, tað er ringt at góðtaka diagnosuna. „Tí tey eru jú so væl fyri“ í byrjanini. Men tíbetur verður man klókari við tíðini og minnist at kunning og hjálp er at fáa“**



**„Tað tykist tíverri sum tað generelt er ov lítið man kann stuðla avvarandi við. Hóast vit hava uppliva góðan stuðul frá demenslandssamskipara, lokalum demenssamskipara/kontaktpersóni, og hava haft møguleikan at luttaka í avvarandi skeiðum á Demensklinikkini, so slítur tað nakað so hart uppá familjuna“**

stuðlaði av í stóran mun, men tað eru tó undir 20%, sum kenna seg stuðlað í stóran mun, sí talvu 2.

Samanbera vit við kanningina frá 2020 síggja vit, at ein lægri prosentpartur av avvarðandi siga seg ikki hava fingið bjóðað tilboðini, sum vit hava spurt um. Td. eru 35%, sum ikki hava fingið bjóðað avvarðandi bólkar samanborið við 45% í kanningini frá 2020, og 27% siga seg ikki hava fingið ráðgeving frá Demenslinjuni hjá Alzheimerfelagnum samanborið við 40% í seinastu kanning. Prosentparturin av avvarðandi, sum siga seg ikki hava brúkt tilboðini eru á leið tann sami. Hettar gevur okkum eina ábending um, at kunningin um tilboð er betrað seinastu árini og møguliga eisini, at tilboðini eru meira skipað. Samanbera vit við kanningina í 2020 svaraðu 16% í hesi kanning, at tey í stóran mun eru stuðlað av landsdemenssamskipara, og 14% at tey í stóran mun eru stuðlað av kommunala demenssamskiparanum, í mun til 10%, sum í 2020 mettu seg í stóran mun stuðlað av demenssamskipara. Í fyrru kanningini varð bert spurt um demenssamskiparar sum heild, tí hvørki skipanir við landsdemenssamskiparum ella kommunalum demenssamskiparum vóru verksettar í stóran mun, eins og tær eru í dag. Men vit síggja, at fleiri siga seg stuðlað í stóran mun av demenssamskiparum. Íalt 8% meta í hesi kanning, at avvarðandi undirvísing á Demensklinikkini stuðlar í stóran mun, í mun til 6% í 2020.

Munur er á, hvussu stuðlaði avvarðandi eru, um ein hyggur at einstøkum bólkum av avvarðandi. Hjúnafelagar tykjast í størri mun stuðlað av tilboðum rættað avvarðandi enn fyri øll avvarðandi. Hettar kemst møguliga av, at hjúnafelagi ofta eisini er nærmasti umsorganarpersónur til persón við demenssjúku. Eitt nú svara fýra av tíggju (40%) hjúnafeløgum, at tey í stóran mun eru stuðlaði av bólkum fyri avvarðandi, og 35% svara, at tey í stóran mun eru stuðlað av ráðgeving frá landsdemenssamskipara. Ein triðingur (33%) av hjúnafeløgum svara, at tey als ikki eru stuðlað av kommunalum skeiðum ella undirvísing til avvarðandi.

Spurt varð eisini um, hvussu nøgd avvarðandi vóru við tilboð til avvarðandi. Á mynd 18 sæst, at 27% av avvarðandi eru í stóran mun nøgd við tilboð til avvarðandi frá Demensklinikkini, 25% við tilboð frá kommununum og 7% við Almannaverkið. Havast skal í huga, at Almannaverkið bert varðar av persónum yngri enn 67 ár, og tí eru nógv fleiri, sum ikki hava fingið bjóða/ikki brúkt hettar tilboð. Mest eyðsæð er tó, at meira enn fýra av tíggju (40%) av avvarðandi siga seg ikki hava brúkt tilboðið/fingið tað bjóðað frá hesum stovnum. Hetta gevur ábending um, at tað framvegis ikki eru nóg nógv tilboð til avvarðandi á demensøkinunum, og/ella at tey avvarðandi ikki brúka hesi.

Spurt varð eisini í hvønn mun avvarðandi vóru nøgd við samskiftið við ymisku stovnarnar, ið varða av økinum. Á mynd 19 sæst, at trý av tíggju (30%) av avvarðandi at persóni við demens eru í stóran mun nøgd við samskiftið við Demensklinikkina og kommunurnar. Men her eru ávikavist 33% og 27%, sum svara, at tey ikki vita, sí mynd 19. Meira enn helvtin (55%) svara, at tey ikki vita, um tey eru nøgd við samskiftið við Almannaverkið. Hyggja vit bara eftir teimum, sum eru avvarðandi til persónar við demens undir 67 ár, eru 13% í stóran mun nøgd við samskiftið við Almannaverkið.

Spurt varð somuleiðis um, í hvønn mun avvarðandi eru kunnað um tilboð til avvarðandi frá ymisku stovnunum. Her er myndin nøkulunda tann sama fyri Demensklinikkina og kommunurnar við ávikavist 20% og 16%, sum í stóran mun hava verið kunnað um tilboð til avvarðandi. Men har

## Í hvussu stóran mun ert tú *nøgd/-ur við tilboð,* sum verða bjóðað til avvarðandi




**Mynd 18:** Nøgdsemi hjá avvarðandi við tilboð til avvarðandi

## Í hvussu stóran mun ert tú *nøgd/-ur við samskifti,* við teir stovnar, ið varða av demensøkinum




**Mynd 19:** Nøgdsemi hjá avvarðandi við samskiftið við almennar stovnar, ið varða av demens økinum.

## Í hvussu stóran mun ert tú *kunnað/-ur um tilboð,* sum verða bjóðað avvarðandi




**Mynd 20:** Kunning um tilboð, ið verða bjóðað til avvarðandi

eru 37%, 63% og 44%, sum als ikki eru kunnað um tilboð frá Demensklinikkini, Almannaverkinum og kommununum (mynd 20). Hesi úrslit benda sostatt á, at avvarandi í sera lítlan mun verða kunnað um tilboð, og at tað – saman við úrslitinum í mynd 18 – bendir á, at tað ikki eru nógv tilboð til avvarðandi – serliga ikki í Almannaverkinum. Hetta kann tí geva ábendingar um, at avvarðandi sjálvi mugu leita sær hjálp og vitan um tilboð til avvarðandi.

**„Tað hevur mest handlað um at yvirliva dagin og klára arbeiði og alt heima og ikki minst við børnum í húsinum, samstundis sum eg havi tikið mær av dementu mammu mínari. Tískil hevur mítt yvirskot ikki verið til at luttaka í nøkrum og tíans heldur at uppsøkja nakra ráðgeving.“**

*Dóttir at personi við demens*

# Niðurstøða

## Ávirkan á gerandisdagin

Niðurstøðan í hesi kanning er, eins og í undarnfarnu kanning, at leikluturin sum avvarðandi at persóni við demens ávirkar gerandisdagin.

Úrslitini vísa, at støðan hjá avvarðandi er á leið tann sama sum í 2020. Eins og í fyrru kanningini vísa úrslitini, at heilsan hjá avvarðandi er ávirkað av leiklutinum sum avvarðandi, og støðan tykist ikki at vera batnað síðan seinastu kanning (65% í mun til 62%). Tað er serliga strongd, svøvntrupulleikar og tunglyndi, sum tey avvarðandi uppliva.

Arbeiðslívið verður eisini ávirkað av leiklutinum sum avvarðandi. Íalt 39% siga, at arbeiðslív teirra er ávirkað samanborið við 44% í fyrru kanningini. Av hesum uppliva 59% eisini ávirkan á fíggjarstøðuna. Ávirkanin á arbeiðslívið er m.a. at verða noydd at arbeiða niðursetta tíð, takka nei til nýggjar arbeiðsmøguleikar og sjúkramelding. Tað eru serliga børn at persóni við demenssjúku, ið uppliva hesa ávirkan á arbeiðslív.

Íalt 27% siga, at leikluturin sum avvarðandi ávirkar fíggjarstøðuna samanborið við 22% í seinastu kanning. Tað eru serliga hjúnafelagar, ið merkja ávirkan á fíggjarstøðuna.

Eins og í fyrru kanningini uppliva meira enn helvtin (56% mótvegis 59%) tvístøður í familjuni orsakað av leiklutinum sum avvarðandi. Tvístøðurnar eru m.a. ymisk sjónarmið um handfaring av sjúkuni, hvussu sjúkur persónurin við demens er, og hvussu tosað verður við persónin við demenssjúku.

Frítíðarlívið ávirkast eisini av leiklutinum sum avvarðandi. Fjórði hvør sigur seg vera avmarkaðan í mun til tíð til sín sjálvs (27%) og 24% uppliva ofta at hava avmarkaðar møguleikar at ferðast. Men sum heild uppliva eitt sindur fleiri í hesi kanning, at frítíðarlívið verður ávirkað av leiklutinum sum avvarðandi.

## Stuðul og tilboð í gerandisdegnum

### Til persónin við demens

Kanningin vísir, at avvarðandi ikki meta, at persónurin við demens verður stuðlaður í nóg stóran mun av fleiri av tilboðunum, sum hann fær bjóðað. Samanborið við fyrru kanningina er støðan eitt vet betri, tí úrslitini geva ábending um at avvarðandi meta tilboðini stuðlandi í størri mun.

Tað eru nøkur tilboð, sum avvarðandi siga, at persónurin við demens í stóran mun er stuðlaður av, m.a. dagtilboði/virkistilboði (41%) og heimahjálp (29%). Hinvegin eru eisini fleiri tilboð sum avvarðandi meta at persónurin við demens ikki verður stuðlaður av, m.a. ergoterapi/fysioterapi/musikterapi (35%). Eisini eru tilboð, sum persónurin ikki hevur fingið bjóðað, t.d. kognitiva stimulatiónsterapi (36%) og bólkar fyri persónar við demenssjúku (29%). Sum heild eru tølini, har avvarðandi hava svarað 'ikki bjóðað', framvegis lutfalsliga høg. Tað vísir, at tað antin framvegis eru ov fá tilboð kring landið, ella at kunningin um hesi ikki er nóg góð.

Avvarðandi til demenssjúk yvir 67 ár eru meira nøgd við kunning og tilboð til persónin við demens enn avvarðandi til demenssjúk undir 67, men í báðum førum eru tað færri enn 30%, sum í stóran mun eru nøgd.

Tað er serliga tilboð frá Almannaverkinum, sum avvarðandi ikki kenna seg kunnað um ella eru nøgd við, um persónurin er undir 67 ár. Einans 13% eru í stóran mun nøgd við tilboð frá Almannaverkium, og 27% í stóran mun nøgd við tilboð frá Demensklinikkini. Er persónurin eldri enn 67 ár eru 29% av avvarðandi eru í stóran mun nøgd við tilboð frá kommununi, og 20% í stóran mun nøgd við tilboð frá Demensklinikkini.

Meira enn helvtin av avvarðandi eru nøgd við samstarv við starvsfólk, við fysisku karmarnar og samskiftið við leiðsluna, tá persónurin er á stovni. Hinvegin eru tað 6 av 10 (59%), sum í lítlan mun ella als ikki eru nøgd við virkismøguleikar gjøgnum dagin.

### Til avvarðandi

Avvarðandi fáa ávís tilboð, men kanningin vísir, at tey ofta ikki verða brúkt og ikki stuðlað nóg mikið. Tað eru sindur fleiri, sum í stóran mun kenna seg stuðlað av tilboðum, men tað eru enn undir 20% av avvarðandi, sum kenna seg stuðlað í stóran mun. Millum 40% og 67% svara, at tey ikki hava brúkt ella fingið bjóðað tilboð, samstundis sum 37% til 63% av avvarðandi ikki kenna seg kunnað um tilboð til avvarðandi frá stovnum, ið varða av demensøkinum. Samanborið við 2020 sæst at ein lægri prosentpartur av avvarðandi siga seg ikki hava fingið bjóðað tilboðini, sum vit hava spurt um. Hettar gevur okkum eina ábending um, at kunningin um tilboð er betra seinastu árini og møguliga eisini, at tilboðini eru meira skipað.

## Samanumtøka

Leikluturin sum avvarðandi hevur ávirkan á heilsustøðu, gerandisdagin hjá fleiri avvarðandi. Støðan er eitt vet betri í mun til tilboð til persónin við demens, og hvussu stuðlandi avvarðandi meta tilboðini eru. Men kanningin vísir, at tað framvegis eru nógv tilboð, sum mælt verður til í Demensætlanini, sum demenssjúk ikki fáa bjóðað, ella sum tey avvarðandi meta ikki stuðla teimum demenssjúku nóg væl. Úrslitini vísa eisini, at fá avvarðandi kenna seg í stóran mun stuðlað av tilboðum til avvarðandi, at tað eru fleiri avvarðandi, sum ikki brúka hesi tilboð, ella sum ikki hava fingið tey bjóðað.

Tað er av alstórum týdningi, at avvarðandi verða kunna um og bjóðað tilboð, sum kunnu hjálpa teimum og persóninum við demens í gerandisdegnum. Hettar er sostatt eitt øki, sum myndugleikarnir eiga at seta sjóneykuna á, og hendan kanning vísir, at batar kunnu gerast.

Støðan tykist betri nú enn í 2020. Seinastu árini er t.d. tilboð um undirvísing blivið meira atkomuligt til avvarðandi, eitt nú frá Demensklinikkini, eins og skipan við landsdemenssamskiparum er komin, sum Demensætlanin leggur upp til (13). Eisini hava fleiri kommunur verksett skipan við kommunalum demenssamskiparum síðan seinastu kanning.

Fyri at varðveita egnar førleikar sum longst, hava tilboð til persónar við demens týdning eins og skipanir við undirvísing, vegleiðing og ráðgeving hava. Tað er somuleiðis av stórum týdningi at kunnað verður um tilboð og tænastur frá stovnum, ið vara av demensøkinum, soleiðis at avvarðandi, ið oftast eru umsorganarpersónar, vita, hvar tey kunnu venda sær, og hvørjir møguleikar eru fyri stuðli. Í mun til framhaldandi at virka endurmennandi, fyribyrgjandi og heilsufremjandi er neyðugt eisini at hyggja at inntrivum, ið kunnu stimbra førleikar hjá persóninum við demenssjúku, soleiðis at hesin kann varðveita teir sum longst.

# Tilvísingar


1. World Health Organization. Dementia [Internet]. Geneva: WHO; 2024 [vitja: 2025 Aug 8]. Available from: https://www.who.int/en/news-room/fact-sheets/detail/dementia

2. Brini S, Hodkinson A, Davies A, Hirani S, Gathercole R, Howard R, Newman SP. In-home dementia caregiving is associated with greater psychological burden and poorer mental health than out-of-home caregiving: a cross-sectional study. Aging Ment Health. 2022;26(4):709-15. doi:10.1080/13607863.2021.1881758

3. Alzheimer's Association. 2021 Alzheimer's disease facts and figures. Alzheimers Dement. 2021;17(3):327-406. doi:10.1002/alz.12328

4. Hellström I, Håkonson C, Erikson H, Sandberg J. Development of older men's caregiving roles for wives with dementia. Scand J Caring Sci. 2017;31(4):957-64. doi:10.1111/scs.12419

5. Greenwood N, Smith R. The oldest carers: a narrative review and synthesis of the experiences of carers aged over 75 years. Maturitas. 2016;94:161-72. doi:10.1016/j.maturitas.2016.10.001

6. Vandepitte S, Van Den Noortgate N, Putman K, Verhaeghe S, Faes K, Annemans L. Effectiveness of supporting informal caregivers of people with dementia: a systematic review of randomized and nonrandomized controlled trials. J Alzheimers Dis. 2016;52(3):929-65. doi:10.3233/JAD-151011

7. Petersen MS, Reinert S, Anthoniussen E. Støðan hjá avvarðandi at persónum við demens í Føroyum. Tórshavn: Alzheimerfelagið; 2021.

8. Simon MA, Bueno MA, Blanco V, Otero P, Vázquez FL. Sleep disturbance, psychological distress and perceived burden in female family caregivers of dependent patients with dementia: a case-control study. Healthcare (Basel). 2022;10(12):2435. doi:10.3390/healthcare10122435

9. Ask H, Langballe EM, Holmen J, Selbæk G, Saltvedt I, Tambs K. Mental health and wellbeing in spouses of persons with dementia: the Nord-Trøndelag health study. BMC Public Health. 2014;14:413. doi:10.1186/1471-2458-14-413

10. Abreu W, Rodrigues T, Sequeira C, Pires R, Sanhudo A. The experience of psychological distress in family caregivers of people with dementia: a cross-sectional study. Perspect Psychiatr Care. 2017;54(2):314-23. doi:10.1111/ppc.12246

11. Alzheimerforeningen. Livet med demens – rapport om en spørgeskemaundersøgelse blandt pårørende til demenspatienter i Danmark. København: Alzheimerforeningen; 2018.

12. H.-L. Peng og Y.-P. Chang, „Sleep Disturbance in Family Caregivers of Individuals With Dementia: A Review of the Literature,“ Perspectives in Psychiatric Care, (2013) 49: 135-146.

13. Demensvinarligt samfelag. Gloymsk – men ikki gloymd. Demensætlan fyri Føroyar 2015. Heilsumálaráði og almannaverkið, 2015

14. A. Johannessen, L. Povlsen, F. Bruvik og I. Ulstein, „Implementation of a multicomponent psychosocial programme for persons with dementia and their families in Norwegian municipalities: experiences from the perspective of healthcare professionals who performed the intervention,“ Scandinavian Jornal of Caring Sciences, 2014 ; 28: 749-756. doi: 10.1111/scs.12107.

15. C. Lethin, I. R. Hallberg, S. Karlsson and A.-C. Janlöv, „Family caregivers experiences of formal care when caring for persons with dementia through the process of the disease,“ Scandinavian Journal of Caring Sciences, 2016 ;30(3):526-534. doi: 10.1111/scs.12275

16. J. M. Peeters, A. P. A. Van Beek, J. H. C. M. Meerveld, P. M. M. Spreeuwenberg og A. L. Francke, „Informal caregivers of persons with dementia, their use of and needs for specific professional support: a survey of the National Dementia Programme,“ BMC Nursing, 2010; 9 (9):1-8. doi: 10.1186/1472-6955-9-9.

17. L. V. Sørensen, F. B. Waldorf og G. Waldemar, „Early counselling and support for patients with mild Alzheimer's disease and their caregivers: A qualitative study on outcome,“ Aging & Mental Health, 2008;12(4): 444-450. doi: 10.1080/13607860802224342.

Frágreiðing

# Støðan hjá avvarðandi at persónum við demenssjúku í Føroyum

Alzheimerfelagið

